annan persón í missiónini, sum nýtti pískin móti teimum innføddu. Fyrst svarandi hann noktandi, men segði síðan, at Mr. Wallbaum hevði ikki bert sæð Danielson nýta hesa framferð, men hann hevði eisini nýtt hana mangar ferðir. Hann váttaði, at tað var "meira enn sjey ferðir men minni enn 12 ferðir".

Sawyers segði, at Mr. Armstrong, Mr. Gilchrist og aðrir limir í missiónini kendu hesa mannagongd. Hann hevði eisini hoyrt, men ikki sæð, at Mr. Ellery hevði pískað eina kvinnu í eini bygd og eisini hennara smáu døtur.

Sjálvt um tey innføddu vóru tápulig, og tað var neyðugt í minstu smálutum at siga teimum, hvat tey skuldu gera, so hevði tað ongantíð skapað honum trupulleikar í samband við hansara smíðingarvirksemi. Hann helt, at tey arbeiddu hampiliga væl."

## Viðmerking

Vit hava roynt at fáa meira at vita um hendan Sawyers, men tað er ikki eydnast enn. Hann er ikki nevndur í nøkrum av okkara keldum. Men hann hevur bæði verið trúboðari og havt smíðing sum yrki. Hetta var ikki óvanligt, at missiónin eisini hevði fólk til eina handliga upplæring av teimum innføddu.

Tað tykist greitt at "the counsil" ikki hevur havt havt nakað serligt álit á Sawyers, tí teir mæla frá, at hann verður sendur aftur til Congo. Tað, sum eisini man hava fingið nevndina at ivast, er, at trúboðarin Harris eisini verður lagdur undir sama ágang. Hann er annars roknaður sum ein av teimum lutfallsliga fáu trúboðarunum, sum royndu at verja fólkið móti yvirganginum hjá myndugleikunum.

Men hetta eru sjálvsagt sera álvarsligar ákærur móti einum trúboðara.

## Fríkenningin

Hósdag 24. september 1903 er fundur í "the Home counsil" í London.

Her verður fyrst greitt frá, at Sir Alfred Jones, konsulin hjá Congo í Liverpool, hevði boðað frá, at hóast stjórnin í Congo ikki vildi geva missiónsfeløgum øki til nýggjar missiónsstøðir, so vildi hon fegin lata Balolo missiónini fíggjarligan stuðul. Tað kann hugsast, at hetta hevur verið eitt slag av mutur fyri at fáa Balolo missiónina at tiga um viðurskiftini í Congo. Jones var ikki heilt ókendur við mutur. Tá ið Edmund Morel arbeiddi á Elder Dempster skipafelagnum, sum sigldi millum Europa og Congo, og Morel kom fram til, at her ruggaði ikki rætt, var tað Jones, sum bjóðaði Morel eina stóra lønarhækking fyri at tiga. Hetta miseydnaðist eisini.

Jones var ein forrætningsmaður, sum hevði tætt samband við skipafelagið sum sigldi millum Liverpool og Congo, og hann var ein íðin verji av stýrinum í Congo.

Dr. Harry Guinness greiddi frá á fundinum, at eftir sum Danielsen varð boðsendur at koma heim vegna ákærur móti honum av privatpersóni, og hesar kærur høvdu víst seg at vera falskar ella í hvussu er vilt yvirdrivnar, varð henda boðsending um at koma heim afturkallað.

Ákærur vóru eisini settar fram móti trúboðararnar Mr. Armstrong, Mr. Ellery umframt Dollan.

Teir høvdu allir svarað hesum ákærum. Tað var staðfest við stórum nøgdsemi, at teirra frágreiðingar eftir gjølligar kanningar hava verið góðkendar av "the counsil", sum fullkomiliga tekur frástøðu frá øllum ákærum móti nevndu persónum.

Tað varð greitt frá, at Daniel er á veg heim oman eftir Congoánni, tá hansara heimkalling vegna hesa ákærur verður afturtikin. Tá er tað, at Roger Casement, sum skal gera eina ferð við amerikanska missiónsbátinum "Henry Reed", manglar ein skipara/maskinmeistara. Casement hittir Dollan og biður hann kom við, og tað gjørdi hann so. Sigast kann kanska, at tað var henda kæran, sum gjørdi, at vit kunnu skriva eina slíka søgu.

## Bakbit í trúboðarasøgu

Her skal skoyast uppí, at hetta mál eisini hevur verið umrøtt í bókini hjá David Lagergen.

Her verður henda kæran hjá Sawyers rátt endurgivin, men tað verður einki sagt um niðurstøðuna hjá stýrinum, og tí standa hesar kærur í leysari luft í bókini. Tað verður bert greitt frá, at kærurnar vóru viðgjørdar á einum fundi í Home Council, sum er umrøddur í fundarbókini og á einum serligum fundi saman við trúboðarum, sum vóru heima í farloyvi. Tað, sum var serliga óheppið, var, at frágreiðingin frá hesum fundi varð likin til umboðsmenn fyri gummiídnaðin í økinum, har Dollin virkaði, og hetta kann saktans hava verið brúkt ímóti honum.

David Lagergren tykist eisini at hava verið ímóti Dollanum. Tað skilst á hansara bók, at ákærurnar eru rættar, og hann undirbyggir hetta við at vísa til dagbókina hjá Casement, har hann nevnir dømi um, at Dollin er lopin fram av. Hetta tykist at vera beinleiðis lúsut. Tí tað sum Casement nevnir í síni dagbók er "bert", at Dollin hevur givið onkrum dreingi ein frammaná. Hetta kann ikki sammetast við ákærur um písking av fólki og gíðslatøku.

Tað er so avgjørt einki, sum bendir á, at Casement ikki hevði álit á Dollanum, heldur er tað hinvegin. Tað er jú eisini, meðan hann er á veg heim orsakað av hesum máli, at hann verður biðin til skipara hjá Casement. Hann hevði neyvan verið góðkendur av honum, um hesar ákærur vóru rættar.

Niðurstøðan má tí vera, at Dollin helst av sínum sinnalagi hevur skapað sær óvinir millum teir hvítu, og hesir hava so ella so viljað lagt honum meinbogar í vegin.

Hetta hendi eisini í eini støðu, har trúboðarar vóru í villareiði, um teir yvirhøvur skuldu finnast at stjórnini ella ikki fyri hennara viðferð av fólkinum. Dollin hevði honum líkt eina greiða støðu, meðan aðrir vóru meira lunkaðir. Tá kundi tað lættliga enda soleiðis, sum her er greitt frá.

Tað er eisini løgið, at einki orð verður í somu bók hjá Lagergren sagt um tað, sum Dollin, hóast hvat kundi havt verið, hevði gjørt fyri fólkið í Congo, meðan hetta verður nevnt um aðrar trúboðarar sum J. H. Harris, sum fyrst var lunkaður móti myndugleikunum, men seinni fóru í part við fólkinum.

## Dollin er komin heim

Fyrst í oktober kemur Dollin heim til Bretlands og hetta merkist eisini á fundarbókini hjá Home Council, har tað tann 22. oktober 1903 verður sagt:

*"Tað var einmælt samtykt at bíða eftir heimkomuni hjá Mr. Casement, bretska konsulinum, áðrenn tilfarið hjá Danielsen um ræðuleikarnar í Congostatinum verður nýtt..*

*Hetta sigur so nakað um, at Dollin beinanvegin, hann er heimkomin, ætlar at fáa Missiónina at leggja í vaðið fyri at kunna um støðuna hjá fólkinum í Congo heima í Bretlandi.*

*Men sum tað fer at koma fram í komandi parti av hesi frásøgn, hevði Dollin ikki tíð at bíða. Casement kom heim 1. desember, men longu 7. november hevur Dollin sín fyrsta almenna fund um skilið í Congo.*

*Men hetta hevur ikki skapt skilna millum partarnar. Tann 26. november verður sagt í fundarbókini:*

*"Tað varð greitt frá, at Pioneer, ein av missiónsbátunum, skuldi hava ein nýggjan ketil. Her hevði Danielsen gjørt sítt tilmæli, og samtykt varð at fylgja tí."*





*Henry Stanley verður ofta settur í samband við David Livingstone. Men ólíkari menn hava ikki verið til. Í sínum bókum reypar hann enntá við tekningum av, hvussu teir innføddu vóru jarðlagdir. Hetta eru tvær av myndunum hjá Stanley sjálvum. Seinni gjørdist hann fremsti handlangari hjá Leopold kongi at fáa Congo lagt undir hansara persónliga ræði*

## Aftur til Congo ella ikki

Tað sum nú verður ein avgerandi spurningur hjá Council er, hvørt Dollin skuldi sendast aftur til Congo ella ikki, og hetta kemur eisini upp á hesum fundinum.

Her verður víst til, at trúboðarafelagin Armstrong sigur, at útsagnirnar hjá Danielson eru víttgangandi og óálítandi, og hann mælir til, at Danielson ikki verður sendur aftur til Congo. Henda sakin var gjølla viðgjørd. Aftaná gjølla viðgerð samdist nevndin um, at bíðað verður við at taka avgerð, tá tað ikki ber til at taka støðu til mótstríðandi metingarnar um Danielson.

Eitt bræv varð eisini lisið frá Danielson, har hann biður um at ein endalig støða verður tikin til hansara framtíð viðvíkjandi Congo. Men semja var um, at nevndin mátti bíða eftir endaligu niðurstøðuni frá økisnevndini "Field Committe" í Congo, áðrenn støða kundi takast.

Dr. Harry Guinnes útgreinaði stutt, hvat gerast skuldi viðvíkjandi Congo. Uppskot var um at gera ein bókling, sum skuldi innihalda teir veruleikar, sum trúboðararnir høvdu um vanstýrið í Congo. Hetta var eisini gjørt við einum bóklingi, sum kallaðist Congo Slavery. Tað var eisini samtykt at halda eina røð av stórfundum í teimum stóru býunum í Bretlandi. Nevndin tók av fullum hjarta undir við hesum tilmæli, at tað skuldi verða sett í verk.

Júst hetta við ætlaðu fundunum er rættiliga áhugavert, tí hetta verður samtykt, áðrenn Casement er heimkomin.

Sum greitt verður frá í komandi parti hevði Dollin longu fyrst í november havt stórar fundir í Edinburgh, eins og hann hevur havt samrøður við fleiri bløð um støðuna í Congo. Hetta kundi bent á at missiónin eftir hesi stig hjá Dollanum er sannførd um, at missiónin mátti fara inn í málið. Men missiónin hevur undir øllum umstøðum byrjað sítt virksemi, áðrenn tað var ætlað.

Hóast pástandin um, at Dollin skuldi vera víttgangandi í sínum útsagnum, er einki sum bendir á, at tað, sum hann hevur sagt um Congo, ikki skal vera eftirfarandi.

## Hóttan úr Congo

Tann 26. januar 1904 er fundur í "counsil", og aftur er framtíðin hjá Dollanum í Congo til viðgerð.